Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

23. juni fingu Katrin Holm og Jóannes S. Jensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2600 gr.

23. juni fingu Diana á Skúr og Aref T. Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3265 gr.

25. juni fingu Oddbjørg Johansen og Kevin Chuks, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

26. juni fingu Maria Matzen og Petur Skeel Dahl, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4000 gr.

26. juni fingu Eyð Berg, Hvalba, og Arnhold Olavsson, Tvøroyri, búsitandi í Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

27. juni fingu Arnleyg og Sigmund Petur Petersen, Skálabotni, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3300 gr.

28. juni fingu Vinnie Johannesen og Svend Arni Andreassen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3250 gr.

29. juni fingu Berlina Sólsker og Tummas Martin Anthoniussen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 2920 gr.

30. juni fingu Annika Brimheim og Ulf Brandt, Keypmannahavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

1. juli fingu Agnes Davidsen og Suni M'Intosh, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2850 gr.

2. juli fingu Elin og Andras Eliassen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4600 gr.

## Dagurin

**5. juli. Anshelmus.** Tað er allarhelst navnið á tí tiltikna guðfrøðinginum og erkabiskupinum í Canterbury, sum doyði í 1109.

**6. juli. Djóni.** Neyvan navn á einum halgimenni. Teir halda, at navnið av tilvild er komið upp í halgimannatalið. Djóni er stytting av grikska gudanavninum Dionysius.

**7. juli. Villebaldus,** deyður í 787. Saman við pápa sínum Rikardi og bróðurinum Vunibaldus gjørdi hesin enski munkurin pílagrímsferð til Róm og var tann einasti, ið kom fram. Seinni gjørdist hann biskupur í Eichstadt í Bayern.

## Andlát

25. juni
Jóannes Østerø, Mikladali, bús. í Vági, 49 ár

26. juni
Sámal Petur Lognberg, Skopun, 84 ár

27. juni
Høgni Traðará, Fuglafjøráur, 22 ár

30. juni
Jona Jacobsen, fødd Ellingsgaard, Eiði, bús. í Miðvági, 85 ár

02. juli
Kristina Kristiansen, Porkeri, 83 ár

# Sverri Trónd Hansen 80 ár

Mánadagin 7. juli fyllir Sverri Trónd Hansen í Havn 80 ár.

Nú tað stundar til ólavsøku, kundi verið nevnt í sambandi við føðingardagin hjá Sverra, at Sverri í heili 51 ár var ein býarmynd á ólavsøku. Tað var hann, sum á rossabaki við merkinum í húnarhátt á ólavsøku leiddi skrúðgonguna við ítróttarfólki oman eftir Niels Finsens gøtu og inn á Tinghúsvøllin. Sverri bar merkið á ólavsøku frá 1947 til og við 1997.



Sverri er føddur í 1923 og vaks upp í reyðu húsnum í Gundadali beint yvir av Hvíldarheiminum. Barnaheimið hjá Sverra var einasta húsið í Gundadali tá - tað lá mestsum uppi í haganum, tí hagaportrið var niðri við Viðarlundina.

Familjan hjá Sverra, og serliga pápin Trónd Hansen, komu tí at hava eitt serligt tilknýti til fótbóltsvøllin í Gundadali, sum fyrstu ferð varð tikin í nýtslu í 1911. Barndómsheimið hjá Sverra var tá einasti grannin til fótbóltsvøllin.

Vit, sum eru eitt sindur yngri, kenna serliga Sverra sum fótbóltsmann og reiðmann. Sum fótbóltsmaður kom Sverri at hava nært tilknýti til fótbóltsvøllin og B36. Vit minnast Sverra sunnumorgun kálka fótbóltsvøllin, sum mangan fleyt í vatni. Tá vóru eingir graslíkisvøllir komnir til landið.

Sverri var stjórnarlimur í ÍSF 1962-63 og 1964-77. Hann var nevndarlimur í fótbóltsdeild ÍSF's 1977-1987. Og nógvar tímar og dagar hevur Sverri nýtt í ÍSF-húsinum og sum ferðaleiðari við ymiskum landsliðum. Árini 1956-72 var Sverri eisini nevndarlimur í B36 og var um sama mundi tvey ár nevdnarlimur í Havnar Svimjifelag.

Sverri er eisini reiðmaður við stóra R. Hann hevur havt ross síðan barnaárini, og tað er framvegis ein vøkur sjón at síggja Sverra geva rossinum í túninum. Hann var altíð so spentur til uppgávuna á ólavsøku. Hesturin skuldi vaskast, striklast og vera væl fyri - ja, Sverri gekk høgt uppí, at hesturin var reinur og nossligur á ólavsøku.

Í 1964 og 1965 var hann formaður í Føroya Ríðingarfelag og var nevndarlimur í felagnum frá 1945 til 1966.

Vit minnast eisini spennandi løturnar, tá Sverri reið kapp, fyrst úti við Krossin í Havnardali og seinni í Marknagili. Sverri og ryssan Hálla settu altíð sín dám á kappríðingina.

Sverri er uppvaksin í Havn, og hann veit nógv um staðarnøvn í Havn og í Suðurstreymoy. Hetta hevur hann undirhildið okkum onnur við í útvarpssending og ikki minst í føðingardøgum og veitslum.

Sverri arbeiddi eitt langt lív sum tekniskur teknari millum annað hjá Byggifelagnum Waagstein og hjá Tórshavnar kommunu. Hann er giftur Onnu, sum er úr Miðvági, og tey eiga børnini Heina, sum býr í Danmark, og Stephaniu, sum býr í Gundadali.

Sverri sæst ikki longur á hestbaki, men seinnapartarnar fer hann oman í Havnina. Leiðin gongur oman í Undirhúsið, har hann eins og onnur, ið har koma, hava nógv at siga frá.

Sverri heldur 80 ára føðingardagin í heiminum í Gundadali leygardagin 12. juli.

# Bryngerð Andreasen 50 ár

Nú sunudagin, 6 juli 2003 fyllir Bryngerð Andreasen á Kambsdali 50 ár.

Nú tú fyllir fimmti, vilja vit bert koma við eini heilsan til tín, tú ert ein góð kona, mamma, omma og systir. Bryngerð er ættað úr Klaksvík, hon eigur ein beiggja, tey eru ættað úr Gerðum í Klaksvík og av Morkranesi. Hon er úr góðum bergi brotin. Vit giftust í 1977 og búðu í Klaksvík til 1979, tá vit fluttu til Fuglafirðar og í 1986 til Kambsdal.



Sum 13 ára gomul byrjaði hon at arbeiða í handlinum hjá mostir síni og partvís í einum øðrum handli, skamt frá har sum hon búði sum genta. Hetta gjørdi hon, til hon var liðug við 10. skúlaár. Síðan gekk hennara leið til handilsskúla í Klaksvik og síðan til Havnar, tá var handlsskúlin um kvøldið. Alla hesa tíðina hevði hon eisini arbeiði í handli.

Eftir at vit fingu eina dóttir, fór hon sjálv undir at dríva handil í Fuglafirði, tað var ein grill við meira. Hendan konan er so væl umtøkt við sínum grillmati, at eg havi sjálvur hoyrt, at grillin í Fuglafirði hevur tann besta grillmatin, ja líka í Suðuroynni hava fólk úttala seg. Mangir Fuglfirðingar siga tað sama um grillina hjá henni.

Ein megnar kvinna tað kunnu vit ásanna, man plagar at siga, at dreingir ofta velja sær eina konu, ið er sum mamman, tað kan eg sjálvur játta, at eg havi fingið eina konu sum er sum mamma mín. Tær fylla eisini dag um dag. Til síðst skulu tit Fuglfirðingar hava eina stóra tøkk, so vinarlig tit eru móti konuni og okkum øllum. Tit eru altíð blíð og fyrikomandi, sigur hon, tá tit vitja í grillini og handla, ja hettar fløvar hjartað.

Tillukku okkara kæra kona, mamma, vermamma, omma og systir, Gud vælsigni teg framyvir.

**Vit í húskinun hjá tær
Ingi Andreasen
Kambsdal**



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Viggo í Stórustovu 70 ár

Í morgin verður Viggo í Stórustovu 70 ár. Hann er føddur 6. juli 1933, foreldur hansara vóru Kims (Kirstine) f. Hansen, ættað úr København og Jacob Jacobsen úr Havn. Eftir kríggið skiftu tey seinna navnið til ættarnavn Jákups, í Stórustovu. Fýra synir vóru í hjúnalagnum, Kaj var elstur, doyði 16 ára gamal í 1946, síðan Viggo, Eyolf, sum doyði 44 ára gamal í 1981, Árni er yngsti, og búgva hann og Josla í Svebølle á Sælandi. Pápin doyði bráðliga í august 1952, 48 ára gamal.



*Viggo í Stórustovu í 1954*

Í yrkjarahami verða sjúti árini ofta javnmett æviskeiði manna - og gamli Grundtvig heldur tey vera »De stolteste strid og møje« – og røkkur skeiðið teim áttati, »Des mere han har at døje«.

Tað var nú ikki tað, eg hevði í tonkunum, nú eg vildi bera vinmanninum kvøðu. Nakrar tankar festi eg tó á blað. Vit vóru í barnalosjuni »Summardáin« sum seks ára gamlir, tað hevur verið stutt fyri kríggið, sum annars gjørdi enda á hesum felagstátti, tí tá myrkaleggingin var ein veruleiki bar ikki til at lata smáu børnini fara frá húsum, hevur verið hildið. Tað var annars mamma hansara, Kims, sum stovnaði barnalosjuna í 1933.

Viggo vaks upp í serligum umhvørvi í einum tíðarskeiði, sum í so mongum setti merki og markaði heimin at siga ógvusliga. Stórar vóru rembingarnar í umheiminum tey árini, Viggo vaks til, og stórliga ávirkaðist eisini umhvørvið hjá Stórustovu-fólkunum her í Havn av hesum rembingum. Abbin hevði tá stóran útflutning til sponsku stórfyritøkuna Trueba y Pardo í Bilbao. Men máttmikli klippfiskaútflutningurin hjá Jóannesi í Stórustovu fekk dygga smeitin, tá borgarakríggið í Spania brann á í 1936 – og tað sveið, marknaðurin hvarv. Tá mistu tey í Stórustovu ognir sínar – húsini bæði við Hoydalsvegin og á hamrinum á Tórgarði - var sjónligi missurin.

Hóast kvøða á 70 áramálsdegnum, er ikki av leið at nevna abban, Jóannes, sum var ein høvuðsmaðurin í strembanini at fáa fiskaturkingina, sum tá var so umráðandi vinnutáttur, »moderniseraðan« – og hann hjálpti mongum at bøta um umstøðurnar at turka fisk – herundir eisini at fáa upp turkihús. Saman við monnum sum Chr. Holm Jacobsen, Zacharis Heinesen og Peter Jensen fekk hann í lag fiskaturking uppi á Hálsi í Havn. Felagið gekk undir navninum NABB. Yviri við Strond fekk hann sær turkipláss við goymsluhúsi og eisini átti hann skonnartina »Sannu« saman við Napoleon Jacobsen á Glyvrum. Hann sat í nevndini á Meiarínum í 1910 og til sín deyðsdag 1941.

Mesta av hesum er úr bókini hjá Mikkjal Helmsdal »verjir fyri Havnarvág«, har stendur um Jóannes í Stórustovu: »Ein, sum kendi Jóannes væl, sigur, at í honum var í kjøti borið at hjálpa og stuðla, har tað kundi gera tað møguligt hjá manni at koma longri fram á leiðini ella fremja okkurt ávíst tiltak«.

Hesi eyðkenni um abban - »hjálpsemi var honum í kjøti borið« - man vera eginleiki, vit kenna aftur hjá eftirkomarum hansara.



*Mynd av málninginum, sum listamaðurin Jákup Olsen málaði í 1935, av húsunum hjá Johannes í Stórustovu og húsunum hjá Jakki og Kims í Stórustovu, (nú húsini hjá Ragnhild Fuglø við Hoydalsvegin), ið var barnaheimið hjá Viggo fram til kríggið, síðst í tríatiárunum*

Tey mongu árini vóru vit saman »í mangari ferð« – Viggo var altíð tilreiðar at rætta eina hjálpandi hond - bar seg ikki undan. Tað var í so ymsum, umframt í uppvøkstrinum og í felagsarbeiði.

Tað var um tað mundið, tey vóru komin í nýbygdu húsini á Dalavegnum undir krígnum, og foreldur hansara høvdu »Centrum«, café og góðgætisbúðina á Áarvegnum.

Viggo tók av heilum huga lut í ungmannafelagsarbeiðnum í Losjuni í Havn og var av ídnastu forsprákarunum, tá ungmannafelagið KYNDIL varð stovnað og sum hann íðin virkaði fyri. Formaður Kyndils var hann í 1961-62 og 1964-65 umframt var hann starvsnevndarlimur í mong ár og virkin leikari, málmaður ikki at gloyma.

Hesi árini í 50-unum, 60-unum og fram í 70 árini vóru rík.

Seinni stovnaði Viggo egnan handil, Ítróttahandilin á Hoydalsvegnum. Viggo nam sær skúla í handilskunnleika í Keypmannahavn, har hann eisini var í vinnu frá 1952-56, fór síðan síðan heimaftur.

Heimafturkomin var Viggo í starvi á Fólkaeftirlitinum, men tá »Centrum« kravdi størri arbeiðsmegi, virkaði hann síðani í fyritøkuni hjá mammuni, sum eisini hevði stóra góðgætisframleiðslu, kend vóru heimagjørdu marsipanbreyðini, páskareggini og konfekt.

Men so saðlaði hann um og fór til sjós, og tað sigst, at hann var ótruliga væl umtóktur kokkur umborð á sluppuni »Bjørgvin«, sum tá var í sildavaðnum, tey árini norðhavssildin stóð tøtt á Føroyaleiðum í 50-unum og upp í 60-ini. Evnini at matgera høvdu ikki einki samband við tiltiknu góðgætisgerðina uppi á Dalavegnum.

Í 1979 fór Viggo í starv á Tryggingarsambandinum, hevði ábyrgdina av flutningi- skjalagoymslu og postinum og gavst í 1993 í hesum starvi, kreppan harða var ein orsøkin - og síðan fór hann av landinum.

Í heimi tykkara bæði í Jóannes Patursssonargøtu og á Tórgarði var gestablídni tiltikið, og mong vóru vit, sum nutu hesa vælveru – tey minnini verða goymd millum tey dýru - og ikki gloymd.

Nú Viggo í Stórustovu situr í Silkeborg, Malmøvej 110, 8600 Silkeborg (tel 086 805470) og hondin ikki røkkur føðingardagsbarninum, bera vit tær og Ingu hjartans lukkuynski um góðan byr framyvir.

**jl**

# P/F Poul Hansen – móttøka fyri trimum starvsfólkum

**Í gjár var móttøka hjá P/F Poul Hansen í Havn, tá trý av starvsfólkunum góvust eftir langa og trúgva tænastu. Tey vóru Sigmund í Hoyvík, ið hevur starvast har í 47 ár, Jens Petur Egholm í 46 ár og Paula Hansen í 25 ár.**

MÓTTØKA
*Magnus Gunnarsson*

Sigmund í Hoyvík er føddur í 1929, sonur Ingu, f. Bærentsen, av Sundi, og Petur Jacobsen, úr Kaldbak, sum búðu í Hoyvík. Sigmund er útbúgvin bankamaður og arbeiddi í Sjóvinnubankanum frá 1945, til hann byrjaði hjá Poul Hansen í 1956. Hann hevur verið bókhaldari, havt roknskap og innkrevjing um hendur og verið roknskaparleiðari. Fyritøkan átti tvey skip og leigaði fleri, hetta førdi nógv virksemi við sær í 50- og 60-unum. Sigmund hevur verið aktivur limur í Dansifelagnum í Havn síðan 1954 og var formaður har í eini 10 ár. Sum pensionistur fær hann tíðina at ganga, hann hevur eina trøð, nakrar seyðir og ymiskt annað at takast við sum t.d. kortspæl.

Paula Hansen er fødd í 1936 í Vági, dóttir Josefinu, f Luid, og Dánjal Midjord úr Hovi. Paula búði í Danmark frá 1960 til 1974. Hon hevur arbeitt hjá Poul Hansen síðan 1977, har hon hevur verið skrivstovukvinna og passað telefonina.

Jens Petur Egholm er føddur í 1933, sonur Margrethu, f. Niclasen, og Petur Egholm í Havn. Hann fór sum ungur til Danmarkar á handilsháskúla, síðan lærdi hann til krambarkall hjá FDB. Í 1956 kom hann aftur til Føroya og fekk starv sum sølumaður hjá Poul Hansen í 1957. Í 1964 var fór hann til Tvøroyar búgva, í sambandi við at Poul Hansen lat upp eina deild har. Hann var leiðari á deildini á Tvøroyri til 1977, tá hann kom aftur til Havnar at vera søluleiðari, samstundis sum hann hevði við proviantering av skipum at gera. Seinnu árini hevði hann bert við proviantering av skipum at gera. Sum sølumaður ferðaðist hann nógv runt í landinum og kom at kenna nógv fólk.




*F.v. Sigmund í Hoyvík, Høgni Hansen, stjóri hjá P/F Poul Hansen, Paula Hansen og Jens Petur Egholm*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hesi trý fólkini sum nú eru farin frá Poul Hansen, siga, at fyritøkan hevur verið eitt gott, spennandi og avbjóðandi arbeiðspláss. Tey hava trivist væl og havt góðar starvsfelagar.

Fyritøkan bleiv stovnað um árskiftið 1926-27 – fyrst sum privat handilsfelag av Poul Hansen, heilsølumanni. 1. oktober 1963 varð virkið umskipað til partafelag. Í dag starvast 55 fólk hjá Poul Hansen á Hálsi í Havn. Frá hálvum august í ár flytur framleiðsludeildin, Krás, til Hósvíkar, har tíggju av starvsfólkunum koma at arbeiða.